


HANDIL

*– Fossábúðin er lítil, men her fær man tað mesta, sigur Annika Brynjar (høgrumegin), sum her keypir frá Maibritt Sivertsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tann lokali handilin

**NORÐDEPIL** – Eg haldi, at tað er ótrúliga gott at hava ein handil her í bygdini, sigur Annika Brynjar úr Hvannasundi. Mikudagin var hon til handils í Fossábúðini.

Snorri Brend

Tað er mikudagur í Norðdepli, men her í handlinum hjá Maibritt er ikki nógv fólk og keypir.

Klokkan er ikki fýra enn, og fólk flest hava neyvan fingið frí frá arbeiðum sínum. Og tey sum eru til arbeiðis í Klaksvík eru ikki komin til húsa enn.

Ein løta gongur áðrenn fyrstu kundarnir koma innar í handilin. Onkur verður spurdur um samanlegging av kommunum, meðan ein teirra, Annika Brynjar, fær eitt heilt annan spurning:

– Hvat tað merkir at hava ein handil her? Eg haldi, at tað er eitt stórt pluss fyri bygdirnar her í økinum, slær hon rimmarfast.

Fólkið í kommununi kenna til tíðir við einum handli í bygdini, og kenna somuleiðis til tíðir við ongum handli.

– Tá eingin handil var hoyrdi ein nógv um, hvussu keðiligt tað var. Nú er tað bara super, sigur hon.

## Strævin tíð

Eins og mong onnur av bygdarfólkum hennara, er Annika av teirri sannføring, at tað lættir sera nógv um hjá teimum at ein handil er her.

– So sleppur ein frá at fara so langan veg sum til Klaksvíkar, um ein ætlar sær til handils, slær hon fast.

Frammanundan Fossábúðini var ein annar handil í Norðdepli. Hann lat tó aftur fyri nøkrum árum síðani, og eitt skifti var sostatt ikki møguleiki at keypa matvørur og annað í bygdini.

– Hetta var ein strævin tíð, minnist Annika Brynjar aftur á.

Nærmastu handlar vóru tá handlarnir í Klaksvík, handilin á Viðareiði – ella um eina valdi eina meiri eksotiska loysn, tann lítli handilin í Árnafirði.

Á heysti í 2007 bórust kortini tey tíðindi í bygdunum kring Hvannasund at ein handil fór at lata upp aftur í Norðdepli, í nánd av skúlanum.

Og stutt eftir lat Maibritt Sivertsen upp Fossábúðina, sum hevur verið opin líka síðani.

## Positivt

Fossábúðin telist ikki millum størstu handlarnar í landinum, men her fær ein kortini ein stóran part av teim vørunum, sum krevjast til eitt vanligt húsarhald.

– Ja, eg haldi at úrvalið av vørum er rættiliga gott, slær Annika fast.

– Serliga tá ein hugsar um, hvussu lítil handilin er.

Hon fær sjálvandi ikki allar vørurnar í lokala handlinum, og er tí viðhvørt noydd at fara til handils í Klaksvík.

Tað er kortini ein stórur fyrimunur við at fara til handils her í Norðdepli: Ein hittir onnur fólk, og fær altíð eitt gott prát við onkran av hinum kundunum.

– Ja, tað er absolutt positivt. Tí so fær ein kanska eisini tey nýggjastu tíðindini við í keypinum, sigur Annika Brynjar við einum brosi.

## So fær man kanska eisini tey nýggjastu tíðindini við í keypinum